ítróttur

Nr. 32 • týsdagur • 18. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Havnin stendur til at missa mannin



*Uppstillingin av Niklas á Líðarenda tykist hava skapt rumbul í landafrøðiliga býtinum av nevndarsessum í FSF*

**Talan verður uttan iva um stríðsval, tá aðalfundurin hjá FSF skal kjósa sær varaformann. Í løtuni eru ábendingar um, at miðstaðarøkið missur nevndarumboðið, men enn eru fýra dagar eftir, og sum skilst verður dúgliga rikið**

FÓTBÓLTSVAL
*Jákup Mørk*

Fleiri av teimum, sum vanliga fylgja væl við, hvat fyriferst innan karmarnar hjá Fótbóltssambandi Føroya, mundu vakna við kaldan dreym fríggjadagin. Uttan at nakar veruliga hevði varnast tað, høvdu gøtumenn sett fram Niklas á Líðarenda sum mótkandidat til Børge B. Hansen sum varaformann í FSF. Eitt var, at Børge, sum hevur verið fastur fúsur í nevndini í fjórðings øld ikki longur kundi kenna seg heilt vísan í at verða afturvaldur. Annað er, at mótkandidaturin kom somikið óvæntað, sum hann gjørdi hesaferð.

Aloftast hevur tað nevnliga verið so, at hóast seinasta freistin at stilla valevni upp, hevur verið 10 dagar undan fundinum, so hevur tað verið ógvuliga opið millum feløgini, hvørji evnini hava verið. Ikki minst soleiðis at stundir hava verið til at finna mótvalevni og ella til at justera landafrøðiliga býtið á nevndini.

Og tað er ikki minst hetta seinasta - tað landafrøðiliga býtið – sum ruðuleiki nú tykist vera komið í. Verður tað so, at Niklas á Líðarenda kemur í nevndini, og tað er tað mangt, sum bendir á, so er samstundis líkt til, at høvuðsstaðarøkið fyri fyrstu ferð er uttan umboðan í nevndini. Av vanligu nevndarlimunum stendur valið millum teir tríggjar, Jens Erik Magnussen, Óla Holm og Sveinbjørn Danielsen, harav Óli og Sveinbjørn helst dystast um sessin fyri Suðuroynna, meðan Jens er trygt umboð fyri Vágoynna. Hinir nevndarlimirnir eru Dánjal Andreasen, formaður, Rúni Heinesen, Karl Vidtfeldt og Christian Andreasen. Hesin seinast nevndi verður tó av fleiri mettur sum umboð fyri miðstaðarøkið, tó at hann hevur røtur í Eysturoynni.

## Nú er at reka

Nú freistin at seta nýggj valevni fram er runnin, er tí lítið at ivast í, tað frá fleiri síðum fer at verða arbeitt við at tryggja Børge nevndarsessin í eitt skeið afturat. Tað verður ikki sagt hart nakra staðni, men tað er lítið at ivast í, at telefonirnar hjá ymsu feløgunum hava kimað dúgliga síðani fríggjadagin, eins og tær gjørdu fyri fýra árum síðani. Tá stóð valið millum Mortan Poulsen og Børge B. Hansen, og tá gjørdist talan um eitt ógvuliga spennandi val. Eitt val, sum Børge at enda vann við einari einsamallir atkvøðu.

Hinvegin er spurningurin, um gott fótarbeiði hjá stuðlunum er nóg mikið hesaferð. Í øllum førum er lítið at ivast í, at mest sum loyniliga uppstillingin av Niklas á Líðarenda er væl fyrireikað. Heldur ikki er nógv at ivast í, at Niklas stendur sterkur millum eysuroyarfeløgini, har stívur triðingur av atkvøðunum hjá aðalfundinum eru at finna. Akkurát hvussu støðan er aðra staðni í landinum er kanska eitt sindur torført at siga, og enn kann nógv eisini broytast. Fýra dagar eru enn eftir til valið, og so er spurningurin, hvør rakstur hevur hilnast betri.

# Nevndin vil hava løn

**Á aðalfundinum í Útvarpshøllini fer nevndin hjá FSF at leggja fram uppskot um at avtaka regluna, sum sigur, at nevndarlimir ikki fáa samsýning fyri arbeiði teirra**

FÓTBÓLTSFUNDUR
*Jákup Mørk*

Tvey uppskot um lógarbroytingar verða lagdar fyri aðalfundin hjá FSF leygardagin.

Sum vit skrivaðu í leygardagsútgávu okkara kundi roknast við, at B71 fór at seta fram upskot um at broyta dystirnar um upp- og niðurflyting, soleiðis at talan her bert verður um tann eina dystin.

## Løn fyri stríðið

Hitt uppskotið til broytingar kemur frá nevndini, sum ætlar at broyta grein 8 í reglunum fyri FSF. Her ljóðar ein setningur í verandi lógini, at »Nevndarlimir fáa onga løn fyri starv síni« men nú vil nevndin hava hesa grein strikaða.

Hvørt nevndarlimirnir í FSF skulu hava samsýning fyri virki sítt er ein spurningur, sum fleiri ferðir áður hevur verið viðgjørdur, men tó ongan tíð í hesum foruminum. Og tí er einki at ivast í, at tað fara at verða sera ymsar fatanir av málinum millum ymsu feløgini.

At nevndarlimir nýta stóran part av frítíð síni til nevndararbeiðið, er einki at ivast í, og fyri fleiri man tað heldur ikki tykjast annað enn rímiligt, at samsýning av onkrum slag verður latin afturfyri. Hinvegin hevur fíggjarstøðan hjá FSF verið alt annað enn góð seinnu árini. Eginpeningurin í seinasta roknskapi varð mest sum bjargaður av, at FSF samtykti liðugtgerðina av bygninginum við Tórsvøll – og harvið tryggjaði sær rætt til miliónastuðul frá FIFA og UEFA – men hinvegin er fjørða í kassanum við tøkum peningi. Lutakastið í inniverandi EM-undankapping var einasta bjargingin fyri framhaldandi landsliðsaktiviteti á øllum stigum, og so er spurningurin, í hvønn mun, feløgini vilja vera við til at fíggja ein dýrkandi yvirbygna. Tann avgerðin fellur á aðalfundinum, men undan atkvøðugreiðsluni er einki at ivast í, at fleiri spurningar skulu svarast.



Kyndil-VB 24-31 (9-20):

# Eitt orð – sorl



*Tað var serliga í verjupartinum, at VB sýndi styrkina, og til tíðir tóktist tað mest sum ógjørligt hjá Kyndli at bróta ígjøgnum verjugarðin*

**Eingin slingur var í valsinum hjá VB, tá tær á útivølli møttu Kyndli, og nú nærkast FM-heitið við fullari ferð**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað tók ikki langa tíð hjá VB at staðfesta, at tær vóru komnar til Havnar eftir tveimum stigum sunnudagin. Mangan hevur VB havt tað sera trupult í júst hesum dystinum, men sunnudagin var so eingin ivi. Als eingin.

## Verja og kontra

Tá 20 minuttir vóru farnir av dystinum, stóð longu 4-15 á máltalvuni, og longu tá mundi hvør tann einasta av teimum grønu hava uppgivið mest sum hvørja vón um at fáa nakað munagott burtur úr dystinum.

Uppskriftin hjá VB var hin sama, sum hon var í finaludystinum – í øllum førum fyrra hálveik – móti VÍF, og sum hon eisini var í dystinum móti VÍF í Vági. Ein dystur, sum av álvara setti í kortið, at VB veruðr ringt at taka aftur í ár.

Við eini verju, sum ikki gav mótstøðuliðnum nógvar møguleikar at bróta ígjøgnum, syrgdu tær fyri, at Kyndil ikki fekk gjørt stórvegis um seg í álopspartinum, og so var bara at sláa kontra hinvegin. Og tað gjørdu tær eisini. Mest sum hvørt mistak frá Kyndli varð straks revsað. Ein langur bóltur frameftir vøllinum, og so var ein av VB-leikarunum fyrst á. Og tað var eisini heilt skjótt, at hetta fór at merkja Kyndilsliðið. Mistøkini í álopspartinum forplantaðu seg eisini í verjupartin, soleiðis at tað til tíðir kundi gera tað sama, um VB var í kontra ella ikki. Støðurnar vóru í øllum førum meinlíkar, tó hóast seks av teimum grønu vardu fyri, kundu VB-kvinnurnar ferð eftir ferð spáka sær ígjøgnum verjuna og senda bóltin framvið eini sakarsleysari Fríðu Petersen í málinum.

## Bara pynt

At VB longu tíggju minuttir undan steðginum kundi taka Reda Kurkauskiene av vøllinum, og at tær í longum løtum eftir steðgin spældu uttan báðar útlendsku stórskjúttarnar, sigur helst nakað um, hvussu tryggar tær kendu seg, og tað var helst eisini hetta sum gjørdi, at Kyndil hóast alt slapp at pynta um úrslitið.

Tí tað var í veruleikanum bert hetta, sum hendi. Kyndil vann seinasta kortérið av dystinum 11-3, men tað var als ikki tí, at tær nú vóru betri enn VB. Snøgt sagt, so vóru tær somikið góðar, sum VB gav teimum loyvi til at vera, og tað sigur helst ikki so lítið um styrkina, sum VB tykist hava í løtuni. At Kyndil so í løtum sýndi ein syndarligan mangul upp á stríðsvilja er eitt annað mál, men yvir høvur tóktist hetta ikki nerta við heildarmyndina av VB-avrikinum.

## Sær gott út

Heldur enn at hava mettað leikararnar tykist steypasigurin á VÍF bert at hava givið leikarunum betri matarlyst til fleiri heiðursmerki, og skal dysturin sunnudagin vera grundarlagið, so er einki at ivast í, at VB verður meistari.

Og sjálvt hjá mest svartskygdu vágbingunum kann nú eisini staðfestast, at tað sær heilt gott út. Hóast grundspælið enn er ungt, so hevur VB longu leikt fleiri av teimum dystunum, sum á pappírinum eru teir truplastu. Tær hava verið á Skála, tær hava verið tvær ferðir í Havn, og av ovaru liðunum í deildini eru tað nú bert Stjørnan og VÍF, sum eru eftir á útivølli. Júst Stjørnan er næsta mótstøðuliðið, og vinnur VB eisini hendan, er trupult at síggja nakran, sum kann steðga teimum á vegnum móti gullinum. Enn er VÍF eftir í Vestmanna, og hetta er helst tann truplasti dysturin av øllum, men sum støðan er í løtuni, so eru enntá eisini ráð at tapa hendan dystin.

Hjá Kyndli mundi tapið sjálvsagt svíða fast, men fyri samlaðu støðuna hjá teimum, nýtist hetta tó ikki at kosta so nógv. Tær eru enn ájavnar Stjørnuni í bronsudystinum, og sum støðan hevur verið í ár, er hetta helst tað mesta, sum Kyndil kann gera sær vónir um. Við hópinum hjá liðnum áttu vónirnar um fínari heiðursmerki helst ikki at veri ógrundaðar. Hesa ferð var liðið enn tá meira styrkt við Sabinu Frølund, sum er komin higar við fótbóltsleikandi manni sínum, men hondbóltur er tíbetur meira enn einføld støddfrøði. Tað er ikki altíð so, at samlaði summurin av einstøku komponentunum gevur samlaða samlaða úrslitið. Meira óítøkilig heiti sum samanhald, stríðsvilji og taktist snildi hava eisini sítt at siga, og her hevur Kyndilsliðið ikki verið nóg sterkt í ár.

## Dysturin í tølum

**Kyndil-VB 24-31(9-20)**

Málskjúttar:

Kyndil: Lotte Sørensen 9(4), Annika Ljósstein 5(3), Ileana Manolescu 4, Heidi Maria Akselsen 3, Sabina Frølund 1, Ann Mari Wang 1, Jensia Petersen 1

VB: Daiva Toumaite 9(2), Reda KLurkauskiene 8, Rannvá Augustinussen 5, Gurið Mortensen 3, Arnleyð Hjelm 3, Laila Jespersen 3

Brotskøst: Kyndil 10, VB 2

Útvísingar: Kyndil 2, VB 1

Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen. Leiddu dystin uttan stórvegis roks í samfullar 60 minuttir.

# Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 4 | 4 - 0 - 0 | 416 | 342 | 74 | 17 |
| 2 VÍF | 5 | 3 - 1 - 1 | 391 | 325 | 66 | 15 |
| 3 Stjørnan | 3 | 1 - 0 - 2 | 317 | 319 | -2 | 10 |
| 4 Kyndil | 4 | 2 - 0 - 2 | 388 | 395 | -7 | 10 |
| 5 Neistin | 4 | 1 - 0 - 3 | 315 | 342 | -27 | 7 |
| 6 StÍF | 3 | 0 - 1 - 2 | 350 | 380 | -30 | 7 |
| 7 Tjaldur | 3 | 1 - 0 - 2 | 300 | 374 | -74 | 3 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 4 | 3 - 0 - 1 | 494 | 407 | 87 | 15 |
| 2 StÍF | 3 | 1 - 2 - 0 | 428 | 375 | 53 | 13 |
| 3 Neistin | 3 | 1 - 1 - 1 | 422 | 392 | 30 | 12 |
| 4 Kyndil | 3 | 1 - 1 - 1 | 397 | 397 | 0 | 9 |
| 5 KÍF | 4 | 1 - 1 - 2 | 410 | 441 | -31 | 8 |
| 6 H71 | 4 | 2 - 0 - 2 | 409 | 463 | -54 | 7 |
| 7 Tjaldur | 3 | 0 - 1 - 2 | 376 | 461 | -85 | 4 |

# Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 127 | (25) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 118 | (36) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 114 | (40) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 113 | (56) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 106 | (16) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 106 | (33) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 104 | (31) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 99 | (20) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 75 | (21) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 72 | (4) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 71 | (1) |
| Alina Olaru | StÍF | 71 | (7) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 65 | (6) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 58 | (9) |
| Laila Jespersen | VB | 57 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 130 | (15) |
| Damir Oros | KÍF | 125 | (26) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 108 | (19) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 106 | (2) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 89 | (7) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 89 | (21) |
| Ingi Olsen | VÍF | 84 | (18) |
| Áki Olsen | VÍF | 82 | (6) |
| Áki Mørk | Neistin | 78 | (22) |
| John Zachariasen | VÍF | 75 | |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 70 | (14) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 65 | |
| Finnur Hansson | Kyndil | 63 | (10) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 61 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 60 | (20) |